# Scrabster bjóðar seg fram sum útgerðarhavn fyri oljuvinnu

*Føroyingar kunnu fáa gagn av komandi útbyggingini av havnini í Scrabster. Betri samband millum Scrabster og føroyska havn kann hava týdning fyri bæði fiskivinnu og oljuvinnu. Ein sendinevnd úr Scrabster hevur júst vitjað. Hon heldur tað vera náttúrligt, at tað verður ein útgerðarhavn í Føroyum og tann í Scrabster, sum koma at veita tænastu til komandi oljuvinnuna í Norðuratlantshavi.*




*Sannlíkt er at oljuvinnan fer at arbeiða millum Skotland og Føroyar, og tí liggur ein útgerðarhavn í Scrabster sera væl fyri eins og ein líknandi havn í Føroyum*



*Havnin í Scrabster í dag. Nú skal hon útbyggjast fyri 250 mill. kr. Caithnessbúgvar búgva seg út til at møta avbjóðingina frá oljuvinnuni vestan fyri Hetland*

Hvat er meira náttúrligt enn eitt tætt samband og samstarv millum norðastu havnina í Skotlandi, Scrabster og so føroyska havn og hví verður hesin møguleiki ikki troyttur meira?

Hetta er ein spurningur, sum verður reistur í hesum døgum, nú ein sendinevnd úr Caithness økinum í Norðurskotlandi vitjar í Føroyum og her bjóðar føroyingum samstarv.

Og lykilin til hetta samstarv - sæð við skotskum eygum - er havnin í Scrabster.

Føroyingar kenna hesa havnina væl. Til fyri fáum árum síðani sigldi Smyril millum Havnina og Scrabster á hvørjum summri. Siglingin datt niðurfyri og varð rutan broytt til Aberdeen í staðin. Hetta m.a. tí, at veganetið millum Scrabster og økini syðri var so vánaligt.

**Góð fyri føroyska fiskivinnu**

Eisini nógvir føroyskir fiskimenn hava tilknýti til Scrabster. Javnan leggja føroysk skip veiðuna upp har, tí hetta er stysti teinurin úr Føroyum til útlendska havn at landa.

Seinastu árini eru gjørdar stórar íløgur í havnina í Scrabster og vegakervið í Norðurskotlandi. Peningurin er fingin til vega úr EU-grunnum.

Nú ætla skotar so at fara undir eina stóra útbygging av havnini í Scrabster upp á einar 250 mill. kr. Eisini her kemur EU-peningur inn í myndina.

Henda útbygging verður gjørd fyrst og fremst við komandi oljuvinnuni vestan og norðan fyri í huga.

Geoffrey Minter, formaður í "Scrabster Harbour Trust", sum er ein sjálvsogandi stovnur, ið m.a. hevur til endamál at skapa fyritreytir fyri vinnulívi og virksemi í økinum, sigur við Sosialin, at vitjan teirra í Føroyum kann fáa týdning fyri bæði føroyingar og eisini skotar.

Hann heldur tað kann vera stórur fyrimunur fyri føroyingar at leggja fiskin upp í Scrabster heldur enn at flyta hann til Aberdeen.

Tí hevur sendinevndin havt fund bæði við strandferðslustjóran og løgmann og víst teimum á fyrimunirnar tað kann hava fyri føroyskan fiskaútflutning, um Smyril aftur fer at sigla upp á Scrabster. Hesin teinurin er bert 12 tímar ella um helvt av teininum til Abedeen. Tá talan er um ferðafólk, so slepst tá eisini undan ringum sjógvi, sum mangan er á leiðunum við Pentland Fith og eisini í Norðsjónum.

Nú infrasrukturin frá Scrabster og víðari er so nógv betraður er eisini lætt og skjótt at koma fram til stórbýirnar og longur suður.

Fyri feska fiskin, sum skal á uppboðssølurnar í Hull og Grimsby, vil flutningur heimleiðis til Scrabster hava við sær, at hann kemur fram skjótari, og dygdin er tá eisini betri.

At Scrabster er góð havn at leggja fiskin upp og fáa hann víðari vísa eisini hagtølini. Fyri tveimum árum síðani varð fiskur fyri 100 mill. kr. landaður har, í dag er upphæddin umleið tann dupulta. Umframt skotar og føroyingar so landa eisini belgisk skip har.

**Stórílega í nýggja havn**

Fyri at betra um umstøðurnar hjá hesum skipum er bøtt um vegakervið, havnaviðurskiftini eru betrað munandi, og nú verður so farið undir 200 milliónar íløguna í nýggja og stórri havn við eitt nú 1000 metra nýggjum bryggjuplássi.

Her verður serstakliga hugsað um komandi oljuvinnuna í økinum. Scrabster liggur sera væl fyri sum útgerðarhavn fyri hesa vinnu. Ætlanin er at Scrabster skal hava sama leiklut fyri oljuvinnuna vestan fyri Hetland sum Aberdeen og Peterhead í dag hava tað fyri oljuvinnuna í Norðsjónum.

Til tess at gera álvara burtur úr ætlanum sínum og ikki missa nakað á gólvið, hevur havnanevndin í Scrabster biðið um serkøna hjálp uttanífrá og er gjørd ein nágreinilig ætlan fyri menningina av økinum, soleiðis at tað í øllum lutum kann tæna komandi oljuvinnuni. Talan verður um ikki minni enn 3000 nýggj arbeiðspláss gongst sum ætlað.

Hesi koma væl við, nú teir hava sløkt fyri kjarnorkuverkinum í Dounreay, sum annars skuldi útbyggjast. Tann ætlanin varð slept, og hetta hevur havt við sær vaksandi arbeiðsloysi í økinum.

Nú skal so ein útgerðarhavn til oljuvinnuna bøta um hetta.

➤



*Tey fimm umboðini úr Scrabster hava júst vitjað løgmann. Fv. Harry Kennedy, Jim Cowie, Geoffrey Minter, Ronald Sampson og David Richard-Jones. Mynd kalmar*

